

Mireille Enos skal spæla Sarah Lund í amerikansku útgávuni av Brotsgerðini, og hon skal tí møguliga brúka troyggjur frá Guðrun & Guðrun

# Brotsgerðin til USA

**DANIR** FARA AT **FRAMLEIÐA** EINA NÝGGJA RØÐ AV **BROTSGERÐINI**, OG NÆSTA ÁR SLEPPA **AMERIKANARAR** EISINI AT UPPLIVA **LØGREGLUKVINNUNA** Í FØROYSKU **TROYGGJUNI**



**BROTSGERÐIN**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Tað hevur gingið so væl við donsku sjónvarpsrøðini Brotsgerðini, at danir ætla at framleiða eina røð afturat, og amerikanarar sleppa næsta ár at uppliva Sarah Lund í sjónvarpi.

Sarah Lund er løgreglukvinna, sum loysir fløktar morðgátur, og tað ger hon í føroyskari troyggju frá Guðrun & Guðrun.

Ein triðja røð við Brotsgerðini skal framleiðast og sendast í 2012, skrivar blaðið Politiken. Danmarks Radio, sum hevur staðið fyri framleiðsluni av Brotsgerðini, hevur ikki váttað, at ein nýggj røð skal gerast, men Politiken heldur seg vita við vissu, at talan verður um eina nýggja røð í 2012.

### Troyggjan til USA

Næsta ár fáa amerikanarar eisini smakkin av Brotsgerðini. Tað er sjónvarprásin AMC, sum keypt røðina, sum verður framleidd av nýggjum við amerikanskum sjónleikarum.

Hetta er fyrstu ferð, at ein donsk sjónvarpsrøð verður seld til eitt sonevnt »remake« – eina endurinnspæling – í USA.

Ein óloysandi partur av donsku røðini hevur verið føroysku troyggjurnar hjá Sarah Lund. Amerikanarar hava eisini staðfest, at troyggjan hevur stóran týdning fyri Sarah Lund, og tey hava skaffað sær troyggjur til amerikansku framleiðsluna.

HJá Guðrun & Guðrun vita tey ikki endaliga enn, um amerikanska Sarah Lund eisini skal brúka teirra troyggjur, men sambært útsagnum í miðlunum bendir nógv á tað.

Og hendir tað, fáa Guðrun & Guðrun kanska fótin fyri seg á amerikanska marknaðinum.

## INNIHALD


2 KLUMMA: **LESKILIGIR LEKAR**
2 BROTSGERÐIN **TIL USA**
4 INTEVIEW: **HANS EILER HAMMER**
7 TIPS: **FLØGUR**
8 BAKGRUND: **WIKILEAKS AVDÚKAR LOYNIDÓMAR**
10 INTERVIEW: **JÓN BJARNASON**
12 90 SEKUND: **RIGMOR DAM**
13 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
13 SKEMT: **Í RANGASTRÚPAN**
18 TIL ARBEIÐIS: **MARIA VILHELMSEN**
19 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK OG ANNAÐ**
20 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**


**KLUMMAN**



*Uni Arge*

# Leskiligir lekar

Ímynda tær, at onkur stovnar eina heimasíðu, sum hevur til endamáls at almannakunngera loynilig skjøl úr miðfyrisitingini, hjá ríkismyndugleikunum og stovnum annars. Ímynda tær, at tað einasta, sum krevst fyri at fáa skjølini kunngjørd, er at senda tey á teldupostadressuna hjá heimasíðuni, sum so kunnger tey. Hvat hevði hent? Høvdu føroyingar, ið hava atgongd til afturlatin skjalasøvn, kent seg freistaðar at slatrað um óreiðiliga og órættvísa atferð hjá myndugleikunum? Høvdu vit tá fingið avdúkað sovorðið, sum vit ongantíð kundu ímyndað okkum fór fram handan leiktjøldini? Høvdu vit fingið innlit í, hvussu trýst verður lagt á embætisfólk í miðfyrisitingini, og hvussu politikarar veruliga eru handan almennu glæstrimyndina? Og høvdu vit í eini handavend fingið innlit í sovorðið sum fullveldissamráðingarnar í 2000? Kanska høvdu vit tað. Og kanska hevði ein tílík heimasíða loypt sovorðnan hvøkk á myndugleikarnar, at teir við stevningum og fútabannum høvdu farið í hernað ímóti heimasíðuni, um teir annars høvdu nóg langar armar til at fáa fatur á henni.

Eitt føroyskt Wikileaks er sjálvandi ikki óhugsandi, og tankin um, at føroyingar fara at royna seg sum *whistleblowers*, tá teir koma fram á óreiðilig viðurskifti, er væl heldur ikki so fjarur. Fólk í umsitingum síggja so mangt, sum tey ikki kunnu siga, tí tey hava tagnarskyldu. Av ótta fyri avleiðingum siga tey tí onki, sjálvt tá tey koma fram á óreiðilig viðurskifti. Men nú Wikileaks við sínum umfatandi avdúkingum er farið í hernað ímóti heimsins stjórnum, verður eitt nýtt kapittul skrivað í journalistiskari søgu. Upplýsingaraktivistarnir á netinum eru nógv meira ágangandi, enn fjølmiðlarnir eru. Teir beinleiðis eggja fólki til at avdúka óreiðiliga atferð, og heimsins stjórnir, ikki minst tann amerikanska, tykjast máttleysar, tí vónleyst er at skrúva fyri streyminum av avdúkingum á frælsa internetinum. Idealistarnir fegnast um gongdina, meðan onnur seta knyklar í brýr, tí er tað veruliga í lagi, at alt, sum finst í afturlatnum skjalasøvnum, skal almannakunngerast? Gera tílíkar avdúkingar størri skaða enn gagn? Ella eru tær neyðugar fyri at avdúka valdsmisnýtslu og statsautoriseraðar lygnir?

Hetta fara journalistisk orðaskifti at snúgva seg um í framtíðini, og tann løgna støðan kann íkoma, at siðbundnu fjølmiðlarnir kunnu fara at taka undir við myndugleikunum, tá myndugleikarnir siga, at upplýsingaraktivistarnir á netinum skaða heimssamfelagið, eins og Hillary Clinton hevur nevnt. Journalistiski vígvøllurin verður tá eitt stríð millum víðgongdu upplýsingaraktivistarnar øðrumegin og myndugleikarnar hinumegin, meðan fjølmiðlarnir so mugu velja, um teir skulu taka landsins áhugamál og trygd framum atlitið til at fáa sannleikan á borðið. Fjølmiðlarnir kunnu á hesum vígvøllinum gerast longdi armurin hjá myndugleikunum, og tá hava leskiligu lekarnir á internetinum av sonnum skapt nýggjar journalistiskar tíðir.

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Hans Eiler Hammer / Jens Kristian Vang